# Umhvørvis-vinarligar vørur til føroyingar



*SA8 vaskievnið, ið tekur burtur olju og skósvertu, uttan minsta trupulleika. Og so við køldum vatni. Og tá ein so vaskar klútin aftaná í sama kalda vatninum, so verður eisini klúturin reinur eftir lítlari løtu, ið ongin skón av feitti sæst í vaskiskálini heldur*

**Trond International hevur umhvørvisvinarligar vørur í hópatali at bjóða føroyingum. Í hesum døgum ferðast fyritøkan kring landið, og millum annað eru vaskievni á skránni, ið ikki oyðileggja vøkru føroysku náttúruna**

NÝTSLA OG UMHVØRVI
*dagfinn@sosialurin.fo*

Mangar av vørunum, ið vit nýta í gerndisdegnum, eru als ikki gagnligar fyri umhvørvið og náttúruna. Hinvegin eru fleiri vørur beinleiðis skaðiligar, tá tær koma í frárenslini og í náttúruna, har tær drepa alt, ið fyri er.

T.d. tá talan er um reingerðarevni, ið eru kemiskt framleidd.

Í hesi ásannan er Trond International við Sonju og Tróndi Fuglø í hesum døgum á ferð kring landið við ymsum náttúruvinarligum vørum, ið ikki skaða umhvørvið á nakran hátt.

Oda Fuglø vísir dyggiliga útsenda frá Sosialinum, tá hesin vitjar framsýning teirra, hvussu t.d. vaskievni, ið er organiskt og tískil niðurbrótiligt í náttúruni, kann vera minst líka gott, sum onnur vaskievni, ið eru kemiskt framleidd, og sum tessvegna oyðileggja í náttúruni.

T.d. SA8 vaskievni, ið tekur burtur olju og skósvertu, uttan minsta trupulleika. Og so við køldum vatni. Og tá ein so vaskar klútin aftaná í sama kalda vatninum, so verður eisini klúturin reinur eftir lítlari løtu, ið ongin skón av feitti sæst í vaskiskálini heldur, tí alt er burtur og niðurbrotið.

Talan er um alskyns vaskievni, ið er at fáa og alt er umhvørvisvinarligt, organiskt og niðurbrótiligt.

Vørurnar hava fingið fleiri umhvørvis viðurkenningar og keypir ein hesar vørur, so er ein eisini við til at stuðla barnahjálpiarbeiði hjá Unicef.

Umframt veskievni av ymsum slag, so umboðar Trond International eisini vørur av sama slag innan smyrsl, kropsrøt, vitaminir og mineralir.




# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Poul Poulsen,*
*Dalatún 7,*
*100 Tórshavn*

**Loysunarorðið:** ...........................................

Navn: ...........................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: .....................................................

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: PASSALIGAR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| P | Á | S | K | A | L | I | L | J | U | R | | M | Á | N | I |
| Á | S | A | T | R | Ú | G | V | | P | Ó | L | U | R | I | N |
| T | A | Ð | | | R | O | | E | P | | A | N | | L | N |
| R | | L | O | G | A | R | I | T | M | A | | N | A | S | K |
| Ú | T | I | | U | | | N | I | Á | L | L | | L | | O |
| G | U | N | N | A | R | | N | | L | U | M | M | I | | M |
| V | | G | I | N | A | Ð | I | | I | M | | I | N | N | I |
| I | V | A | N | O | V | | L | U | N | I | K | | L | O | N |
| N | Á | H | | | A | K | I | | G | N | | F | A | R | |
| | G | E | V | | R | | G | S | | I | | A | N | G | I |
| K | I | L | O | | | L | A | M | P | U | R | | G | E | V |
| V | | L | L | L | L | L | | Æ | | M | A | T | A | | A |
| I | T | A | L | I | A | | T | R | I | | S | O | R | O | S |
| N | E | | I | T | | Ø | V | A | R | | K | R | | G | A |
| N | I | M | | I | N | N | A | | M | E | I | R | A | | M |
| A | R | M | E | N | I | A | | K | A | T | R | I | N | | I |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar***
***– bæði innan og uttan skúlagátt***